FS Vágar-Skála 3-4 (0-2):

# Dýrt at yvirliva…



Enn livir Skála í vónini. Ein møguligur sigur í seinasta umfarinum kann føra við sær, at Skála annað árið á rað skal bjarga lívinum við einum framúr endaspurti

**Skála fekk sigurin, liðið hevði brúk fyri í Miðvági, men prísurin var kanska so stórur, at seinni neyðugi sigurin verður tungur at taka, tí tríggir mans hava leikbann næstu ferð. Hóast tapið kann FS Vágar framvegis avgera sína egnu lagnu.**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í allarseinastu sekundunum í Miðvági stóð nógv á gomlum nøglum hjá Skála, tí FS Vágar trýsti og trýsti av øllum alvi. Støðan var 4-3 til skálamenn, men við einum útjavnandi máli høvdu vágamenn sent gestirnar niður í 2. deild og sjálvir sloppið undan tí vandanum.

Tað eydnaðist eisini FS Vágum at fáa bóltin í málið hjá Skála fyri fjórðu ferð, tá allarseinasta hornasparkið kom innfyri, men áðrenn bólturin var komin ordiliga inn fyri málið, bríkslaði dómarin í Miðvági, Lassin Isaksen, fyri seinastu ferð sunnudagin.

Hetta líkaði ikki vágamonnum, hóast klokkan var farin meira enn hálvan minutt út um teir tríggjar, dómarin hevði lagt aftrat. Men liðugt var, og skálamenn hava enn ein kjans og vágamenn enn eina viku á pínubonkinum.

Skála hevur nú 9 stig, FS Vágar 11 og VB 13, so enn kann nokk so nógv henda í botninum, áðrenn landskappingin er liðug seinnapartin leygardagin. Tvey lið kunnu enn flyta beinleiðis niður og tvey lið kunnu koma í ta støðu at spæla móti TB um at varðveita 1. deildarplássið. FS Vágar hevur báðar møguleikarnar…

### Dýrur sigur

Hóast Skála yvirlivdi sunnudagin og enn hevur eitt hálmstrá at halda í, kostaði sigurin í Miðvági ikki so lítið. Undan dystinum stóðu sjey leikarar til at fáa leikbann, um teir fingu kort, og tríggir fingu hesa lagnu - enntá tríggir av teimum fýra í aftastu verjuketuni!

- Hetta ger ikki útlitini hjá okkum bjartari undan seinasta dystinum, sum verður á heimavølli móti EB/Streymi, tí hópurin er smalur. Vit noyðast niður í 3. ella 4. deild eftir fólki at seta í verjuna, sigur Johan Nielsen, venjari hjá Skála.

Hann er mest kendur sum gullvenjari hjá GÍ og HB gjøgnum árini, men nú stendur hann við ábyrgdini fyri einum liði, ið hevur niðurflytingarvandan hangandi yvir sær. Men hetta hevur hann eisini roynt fyrr:

- Ájú, eg eri fyrr fluttur niður. Tað var í 80-unum sum venjari hjá B36. Men lat okkum nú síggja, hvussu seinasta umfarið endar, áðrenn vit fara at tosa ov nógv um tað, sigur Skála-venjarin, ið tó ikki dylir fyri, at hann fær sítt at hugsa um hesa vikuna.

- Vit fáa ikki nakran léttan dyst móti EB/Streymi, sum hevur skjótar framherjar. Tað kemur undir øllum umstøðum at leggja trýst á verjuna hjá okkum. So er spurningurin bara, um vit fáa skavað eina verju saman, ið kanska klárar at halda henda eina dystin.

Eydnast Skála at yvirliva og fáa teir báðar dystirnar aftrat móti TB um evsta plássið í 1. deild næsta ár, er sjálvandi vanliga verjan tøk aftur. Men so er spurningurin sjálvandi, um aðrir fáa leikbann til ta tíð. Fýra eru í vanda enn, so nógv stendur opið, nú Skála skal royna at endurtaka spurtin frá í fjør, ið bjargaði liðnum tey allarseinastu umførini.

### Kunnu avgera sjálvir

Hjá vágamonnum er støðan sjálvandi eitt lítið sindur frægari, hóast dysturin sunnudagin varð taptur. Og enn kann FS Vágar sjálvt avgera sína lagnu, hóast tað nokk krevur ríkiliga nógv av liðnum:

- Vit skulu bara vinna í Runavík, so hava vit í øllum førum sloppið okkum undan beinleiðis niðurflyting. Men vandin er sjálvandi tann, at NSÍ einki hevur at stríðast fyri og tí kann spæla frítt, sigur Albert Ellefsen, venjari hjá FS Vágum.

- Allarhelst vildu vit sloppið fram um VB eisini, tí so vóru vit fullkomuliga leysir av øllum, sum hevur við eina møguliga niðurflyting at gera. Tað er tó upp til okkum sjálvar, hóast EB/Streymur sjálvandi kann hjálpa okkum við at vinna á Skála.

At dysturin í Miðvági sunnudagin endaði við einum málríkum ósigri, var sjálvandi ein strika í rokningini hjá FS Vágum, sum annars hevði fyrireikað seg væl til júst henda dystin.

- Vit vistu, at skálamenn eru skjótir í mótálopunum, og tað høvdu vit eisini vant við í vikuni, so vit kundu fyribyrgja teimum í at sleppa avstað. Men kortini vóru fleiri av okkara monnum ikki klárir í dystinum, og so máttu vit rinda prísin fyri tað, sigur venjarin hjá vágamonnum, ið var bilsin av, at Skála megnaði at halda so nógva ferð allan dystin.

### Fínur dystur

Hóast talan var um reina botnuppgerð og eitt ríkiliga frískt lot, so var dysturin í Miðvági ein av teimum frægaru. Sjey mál og eitt á muni tala fyri seg, men eisini ferðin var høg - nakað, ið annars ikki plagar at eyðkenna botndystir.

Liðini áttu hvør sín hálvleik, so skálamenn byrjaðu betur, men máttu kenna seg trýstar í botn meginpartin av síðstu trimum korterunum. Effektiviteturin var tó størri hjá Skála, ið hevði uppborið sigurin, tá avtornaði.

Mestsum beinanvegin sást, at Skála var komið fyri at stríðast og vinna, og Aleksandur Johansen gjørdist lyklaleikarin fram um allar, tá hann skoraði trý mál og legði upp til tað fjórða. Hann hevði einki landskappingarmál skorað í ár undan dystinum sunnudagin, men kendi so sanniliga sína vitjunartíð!

Við tveimum málum í fyrra hálvleiki legði hann lunnar undir sigurin, men eitt korter inn í seinna hálvleik fekk Birgir Joensen minkað fyri FS Vágar, ið dúgliga trýsti fyri at fáa javnað eisini. Júst hetta trýstið gav skálamonnum pláss til at fara hinvegin við nógvari ferð, og í einum av skjótum mótálopi skoraði Aleksandur triðju ferð og legði Skála framum 3-1.

Tveir minuttir fyri tíð var hann aftur upp á spæl, tá hann setti ferð á frameftir í vinstru síðu og endaði við at senda flatt innfyri til Jónhard Frederiksberg, ið fekk prikað bóltin í málið til 4-1. Tá hetta málið kom, vóru skálamenninir bara tíggju eftir á vøllinum.

Nú sá dysturin avgjørdur út, men í evstu løtuni tveitti FS Vágar alt fólkið fram - enntá málverjan, Jákup Joensen. Tað gav úrslit í tveimum málum. Tað fyrra skoraði Albert Ari Thomassen við beinleiðis frísparki, og tveir minuttir inni í yvirtíðini skallaði Clayton Soares tað triðja.

FS Vágar royndi at útnytta yvirtíðina til fulnar fyri eisini at fáa útjavnandi málið, men hetta eydnaðist ikki. Tí er botnurin enn púra opin, nú bara eittans umfarið er eftir.

### Dysturin í tølum:

**FS Vágar-Skála 3-4 (0-2)**
0-1: Alexandur Johansen, 11.
0-2: Alexandur Johansen, 31.
1-2: Birgir Joensen, 59.
1-3: Alexandur Johansen, 65.
1-4: Jónhard Frederiksberg, 88.
2-4: Albert Ari Thomassen, 90.
3-4: Clayton Soares, 92.
Dómari: Lassin Isaksen

FS Vágar: Jákup Joensen - Jógvan Hendrik Samuelsen, Jack Johansen, Albert Ari Thomassen, Vladens Osipovs - Sjúrður Ellefsen (Eyðfinn Fjalsbak, 77.), Jóhannus Olsen (Silva de Braga, 68.), Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen - Birgir Joensen (John Johansen, 77.), Clayton Soares
Gul kort: Albert Ari Thomassen (74.), John Johansen (82.)

Skála: Eugen Voda - Ronni Hansen, Arnhold Berg, Dusan Jaic, Iulian Florescu - Bogi Gregersen, Pauli G. Hansen, Aleksandar Jovevic, Hanus Thorleifsson - Alexandur Johansen, Jónhard Frederiksberg (Bárður Danielsen, 89.)
Gul kort: Dusan Jaic (40.), Arnhold Berg (42. og 85.), Iulian Florescu (65.)
Reytt kort: Arnhold Berg (85.)



EB/Streymur-VB 2-0 (1-0):

# Stirnir vágbingar eru illa sperdir

**Sorin Anghel legði botn undir heimasigurin ímóti máttleysum vágbingum, áðrenn hann orsaka av skaða noyddist at taka seg av vøllinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Hóast VB royndi at muta ímóti, so høvdu Magni á Lakjuni og liðfelagarnir fult tamarhald á støðuni, tá dystast var á Eiðismøl
*Mynd: Sofus Johannesen*

Eingin ivi er um, at EB/Streymur nú er fast inventar í bestu deildini. Tað hevur seinnu árini eingin ivi verið um, at VB hevur verið fast inventar í bestu deildini. Trumfin settu teir á í 2000, tá ið teir vunnu fyrsta og higartil einasta meistaraskapin.

Nú er VB langt frá gullinum. Spurningurin er, um teir fara at megna at halda tørn um plássið í bestu deildini. Tað verður greitt leygardagin, tá ið VB fer at seta sítt álit á, at NSÍ fer at taka øll stigini ímóti FS Vágum. Tað tykist í løtuni meiri upplagt, enn tað ger, at VB skal fáa stig ímóti B68. Sjálvt um VB fer at spæla í heimaskansanum á Vágseiði.

EB/Streymur spælir fyri at lyfta sær upp um miðstrikuna, har teir ongantíð hava verið áður. Setningin á heimavølli ímóti VB greiddu teir til fulnar. Enn eina ferð var Sorin Anghel hollur stuðul. Hann var bara á vøllinum í eitt korter. So noyddist hann at taka seg aftur, tí skaðin, sum síðani summarfrítíðina fleiri ferðir hevur hildið honum burtur, argaði. Men áðrenn hann fór av vøllinum, hevði vandamikli álopsspælarin skorað. Álopsfelagin hjá honum, Magni á Lakjuni, tóktist royna ímóti málinum. Skotroyndin var eitt sindur kiksað, men Sorin Anghel var fyrstur á, og hann skoraði til 1–0, meðan verjuspælið hjá VB ikki var í serliga góðum standi.

Heimaliðið var greitt omaná. Teir vunnu nærdystirnar, og teir fluttu seg betri enn gestirnir, sum ikki hava verið væl upplagdir leingi, og sum nú eisini stríðast við veruleikan, at tað meiri ella minni brennur undir teimum.

Hóast VB hevur nógvar evnaríkar spælarar, so hongur tað ikki nóg væl saman. Teir megna ikki at spæla seg til málmøguleikar, og teir eru ikki nóg avgjørdir í verjupartinum.

Stutt eftir steðgin staðfesti EB/Streymur heimasigurin. Gert Hansen, sum er komin í verjuna eftir summarsteðgin, og sum hevur skorað fleiri mál, var hægstur og við høvdinum sendi hann inn um Bjarna Johansen.

So var avgjørt, at stigini skuldu vera á Mølini, og at VB skuldi suður við ongum. EB/Streymur eigur leygardagin botnliðið Skála á útivølli. Fyri vágbingar ger tað næstan tað sama, hvussu tað fer at tørna út á Skála. Um vágbingar skulu sleppa undan eyka fótbóltsvikum og nervapirrandi uppgerðum ímóti tvørámonnum, so skulu teir fáa stig ímóti B68 ella hava eyguni vend ímóti Runavík, har teir skulu vóna, at NSÍ fer at vinna øll stigini ímóti FS Vágum.

EB/Streymur-VB 2-0 (1-0)
1-0 Sorin Anghel 11.
2-0 Gert Hansen 53.
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Gert Hansen, Egil á Bø, Andrzej Pacek, Bárður Olsen – Jákup Martin Joensen, Marek Wierzbicki, Ronnie Samuelsen, Hans Pauli Samuelsen (Marni Djurhuus, 76.) – Sorin Anghel (Hallur Jacobsen, 16.), Magni á Lakjuni.
Gult kort: Hallur Jacobsen
VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Janus Kjærbo – Mortan úr Hørg, Milan Kuljic, Poul Poulsen (Sigmund Mikkelsen, 68.), Palli Augustinussen, Anders Sørensen – Birgir Jørgensen, Brian Andresen.
Dómari: Dagfinn Olsen

TB-KÍ 4-1 (1-1)

# Seigir tvørámenn

2. DEILD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

TB fær nú aftur møguleikan at spæla fótbólt í bestu deildini. Ella í øllum førum hava teir møguleikan at spæla um hendan møguleikan.

Hesum syrgdu tvøramenn fyri, tá teir á heimavølli vunnu 4-1 á KÍ. Tað vóru annars klaks-víkingarnir, sum løgdu seg á odda, men eftir at TB hevði javnað, var tað alla tíðina sjónligt, hvønn vegin tað bar.

Eftir steðgin staðfesti TB sigurin við trimum málum, og nú er um at vera klárt til dystirnar, sum skulu gera av, hvørt aldursforsetin aftur skal vinna seg í fremstu røð.

Sum landið liggur í løtuni, so verður tað móti FS Vágum, at hesin dysturin skal spælast, og tað hevur TB helst einki ímóti. Í øllum førum var tað TB, sum dróg longra stráðið, tá somu lið dystaðust um sessin fyri nøkrum árum síðani, men hinvegin stendur møguleikin fyri eini lokaluppgerð móti VB ella einari revansju móti Skála eisini opin. Og tann spurningurin verður so ikki svaraður fyrr enn næsta leygardag.

**dysturin í tølum**

TB-KÍ 4-1 (1-1)
0-1: Marius Nystrøm
1-1: Kaj Roest
2-1: Olivur Abrahamsen
3-1: Hallur Christiansen
4-1: Jens R. Sørensen

AB-VB 7-0 (2-0):

# Sorl á Argjum

2. DEILD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Har var einki at ivast í, tá VB leygardagin vitjaði á Argjum AB hevur enn vónina um, at tað skal bera til at vinna sær heiðursmerki í ár, og tað var ikki við mýkindum, at teir tóku ímóti VB, sum fullkomuliga er steðgað upp í seinnu hálvu.

Ikki minni enn 7-0 gjørdist endaliga úrslitið, og tó at tað enn eru seks stig upp til Sumba á triðja plássinum, so kann hetta broytast í vikuni. Enn hevur dómsnevndin nevnliga ikki gjørt av, hvussu verður við kærumálinum frá dystinum millum júst Sumba og AB. Vinnur AB hesa, so eru teir ájavnir Sumba í stigum, og við muninum í innanhýsis uppgerðunum kunnu argjamenn tá sjálvir gera av, hvørt talan skal vera um heiðursmerkir longu fyrsta árið í aðru deild.

### Dysturin í tølum

1-0: Johnny Samuelsen
2-0: Símun Hansen
3-0: Eyðun Samuelsen
4-0: Flóvin Jespersen
5-0: Pætur Dam Jacobsen
6-0: Svenning W. Hansen
7-0: Karl Leonsson

Sumba-B36 2-2 (1-2):

# Sumba misti møguleikan

2. DEILD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

So er staðfest, at tað so ikki verður komandi ár, at Sumba fer at spæla fótbólt í bestu deildini. Leygardagin hevði Sumba vitjan at B36, og hetta var ein dystur, sum skuldi vinnast, um møguleikin framvegis skuldi vera til staðar.

Men B36 hevur í seinnu hálvu veruliga funnið stevið, og teir vildu ikki bara leggja seg niður soleiðis uttan víðari. Við málum frá Tórálvi Poulsen og Sonna Johansen megnaði árstalsfelagið eisini tvær reisur at leggja seg á odda, og tó at Sumba báðu ferðirnar svaraðu aftur, so var hetta ikki nóg mikið.

Soleiðis hevur Sumba nú bert bronsuna at halda seg til, og í vikuni fer dómsnevndin at gera av, hvørt hesin møguleikin eisini skal gleppa teimum av hondum.

### Dysturin í tølum

Sumba-B36 2-2 (1-2)
0-1: Tórálvur Poulsen
1-1: Rene Thomsen
1-2: Sonni Johansen
2-2: Rene Thomsen